Oddagrein

Greinarnar í hesi útgávuni umrøða hugtakið *lóg* úr trimum ymiskum sjónarhornum.

Í fyrstu greinini viðger Kristian Joensen, námslektari á Fróðskaparsetri Føroya, spurningin, um statshugtakið, við serligum atliti til um Cookoyggjar og Niue, eru statir eftir altjóðarætti. Hann førir fram, at svarið valdast, um spurt verður útfrá sjónarhorninum á antin sokallaðu *deklaratorisku* ella *konstitutivu* fatanini av, hvønn týdning viðurkenning frá øðrum statum hevur á statshugtakið.

Mikael Karlsson, atknýttur professari í lóg, viðger í næstu greinini áskoðanirnar hjá sankta Thomas Akinas á, um *lóg*, sum hugtak, er *bindandi* og samspælið millum eginleikarnar hjá lógini at ávikavist *binda* og *áleggja skyldur at verða lýðin*. Viðkomandi spurningar verða settir, sum t.d. um bindandi eginleikin hjá lógini er grundaður á, at lógin er stuðlað við tvingsilstiltøkum. Um lógarskipanin er grundleggjandi ein tvingsilsskipan? Um hesin eginleikin hevur røtur í siðvenju. Um tað kann javnmetast at verða *bundin av lógini* og at *hava skyldu at akta hana*. Um *tvingsil* ella *siðvenja* kunnu skapa slíkar *skyldur*. Og at enda: hvat er *ein skylda*, hóast alt?

Í triðju greinini viðger Frederick Schauer, professari í lóg á University of Virginia, hvussu dómarar, og onnur við viðkomandi heimildum taka avgerðir í truplum málum. Greinin viðgerð samspælið millum ymiskar fatanir av hvussu *lógin* verður nýtt í trupulum málum, við serligum atliti til, um ein *einans* kann og eigur at nýta lógina, hóast eingin áseting er um viðurskiftini í einum trupulum máli, ella í hvønn mun og undir hvørjum treytum, lógin loyvir dómarum og øðrum, ið taka løgfrøðiligar avgerðir, at leita *víðari* enn til lógina til tess at røkka niðurstøður teirra.

Hóast greinarnar ikki viðgera *serføroysk* viðurskifti, kunnu evnini tó sigast at vera eins viðkomandi fyri føroyska løgdømið, sum fyri onnur løgdømi kring heimin. Bæði í søguligum høpi, í mun til verandi støðu, og í mun til altjóða samfelagið, geva evnini íblástur til at seta spurningar sum: *í hvønn eru Føroyar ein statur sambært altjóða lóg*? Hesin spurningur er luttvíst viðgjørdur í áhugaverdari grein eftir Halgir Winther Poulsen *Eru føroyingar tjóð?,* sum varð útgiving í *Føroyskum Lógar Riti* í 2001.

Eisini er áhugavert at spyrja, um føroysk lóg annahvørt er *bindandi* ella *skyldu-*

1 LLM í almennari altjóða lóg og MA í stjórnmálafrøði og altjóða viðurskiftum frá University of Aberdeen.

bindandi, antin tí hon er stuðlað av møguligum tvingsilsátøkum, tí hon er siðvenja, orsakað av moralskari sannføring ella av øðrum orsøkum. Ella í hvønn mun vit kenna okkum bundin ella skyldubundin at vera lógini lýðin.

Evnið í triðju greinini er somu leiðis viðkomandi føroyska løgdømið, sum lutfalsliga í stóran mun er grundað á, og *lænir* úr, útlendskum lógarskipanum, umframt at orkan í lógarverkinum er lutfalsliga avmarkað í mun til onnur lond. Stórur tørvur er tí á gransking og undirvísing í føroyskum lógarviðurskiftum, og vónandi fara evnini í hesari útgávu at kveikja áhuga og íblástur fyri lesaran.

Editorial

The articles of this edition address at the concept of law from three different perspectives.

In the first article, Kristian Joensen, teaching lecturer at the University of Faroe Islands, analyses the state-concept, with special focus on whether the Cook Islands and Niue are states according to international law. He argues that the answer depends on whether you ask from the perspective of the so called declarative or constitutive understanding of which importance the recognition from other states has on the state-concept.

In the second article, Mikael Karlsson, affiliated professor of law, attempts to explicate the views of St. Thomas Aquinas concerning the binding nature of law and the relationship between a law's being *binding* and it's *imposing an obligation to obey*. Relevant questions are analysed, for instance whether the binding nature of law is based on coercion? Is the legal order fundamentally a coercive order? Does their entrenchment lie in custom? And is being *bound by a law* the same thing as having an *obligation to obey it*? Could *coercion* or *custom* create such an *obligation*? And what is an *obligation*, anyway?

In the third article Frederick Schauer, professor of law at the University of Virginia School of Law, analyses how judges, and others with relevant authority, decide hard cases. The article analyses the interactions between different understandings of how *the law* is used in hard cases, with special focus on whether one only can and ought to use the law, even if there is no specific content of the matters of a hard case, or to what extent and under which circumstances the law allows judges and others who make legal decisions to look outside the law in order to reach a conclusion.

Even if the articles do not address unique Faroese matters the topcis can be said to be as important for the Faroese jurisdiction, as it is for other jurisdictions around the world. Both in historical context, in relation to the present situation and in respect to the international community, the topics inspire the reader to ask: *to what extent are the Faroe Islands a state according to international law*? This question is partially addressed in the interesting article by Halgir Winther Poulsen *Are the Faroese a Nation? w*hich was published in the Faroese Law Review in 2001.

It is also interesting to ask to what extent Faroese law is binding or obligating either because it is supported by coercive measures? Because of custom? Because

of moral conviction or for other reasons? or to what extent we feel bound or obliged to obey the law?

The topic of the third article is likewise relevant for the Faroese jurisdiction which in relatively to a large extent is based on, and *borrows* from, foreign legal system, and in addition the resources of the legal system are relatively limited compared to other countries. Therefore there is a fundamental need for research and education in Faroese legal matters, and hopefully the topics of this edition will arouse interest and inspiration for the reader.